Journalnr.: 146
Dagfesting: 08-10-2024
Rev. 11.10.2024

**Útbygging av Farstøðini – Vága Floghavn – Undangóðkenning – Rev. A**

Broytingar eru merktar við bláum, meðan minkingar eru merktar við reyðum

Í sambandi við økta virksemið og økta talið av ferðafólki umvegis Vága Floghavn (FAE) og sum liður í samlaðu heildarætlanini fyri FAE, verður boðið til undangóðkenning til verkætlanarkapping fyri sniðgeving og heildarráðgeving av út- og umbygging av farstøðini.

Tað er visjón byggiharrans, at samlaða byggingin í Vága Floghavn í framtíðini verður ein heild. Mest týðandi bygningur verður farstøðin og takta økið framman fyri farstøðina. Verandi farstøð skal funktionelt virka sum ein eind saman við nýggja partin av farstøðini, eins og byggilistaligu virðini skullu sampakka.

***Útboð***
Útboðið verður gjørt sum avmarkað útboð, har 3-5 undangóðkendir luttakarar verða bodnir at koma við tilboði.
Uppgávan umfatar heildarráðgeving í sambandi við gerð av skipanaruppskoti, verkætlanaruppskoti, forprosjekti, høvuðsprosjekti, útboði í høvuðsarbeiðstøku, umframt uppfylging og eftirlit í sambandi við útinnan. Byggiharring tekur støðu til um projekteringsleiðsla og byggileiðsla verða við í heildarráðgevingini seinni, í samband við ráðgevarasáttmála. Uppgávan umfatar eisini tilhoyrandi útiøki á bæði almennu økjunum (landside) og á standplássum og øðrum økjum innanfyri flogvallargirðingina (airside) .

***Tíðarætlan***

| | |
|---|---|
| Innbjóðing til undangóðkenning: ........................ | 09.10.2024 |
| Umsøkn um undangóðkenning til byggiharra ...... | 30.10.2024 |
| Útboð av ráðgeving (hugskots/projektkapping) | 13.11.2024 |
| Tilboð uppá ráðgeving (hugskots/projektkapping) | 08.05.2025 |
| Ráðgevarasáttmáli ............................................. | 05.06.2025 |
| Prosjektering (niðurtøka og grovplanering) ........ | 05.12.2025 |
| - Útbjóðing til arbeiðstakarar .......................... | 12.12.2025 |
| - Licitatión ...................................................... | 07.01.2026 |
| - Arbeiðstakarasáttmáli ................................. | 21.01.2026 |
| Prosjektering (liðug) .......................................... | 13.08.2026 |
| - Útbjóðing til arbeiðstakarar .......................... | 27.08.2026 |
| - Licitatión ...................................................... | 15.10.2026 |
| - Arbeiðstakarasáttmáli ................................. | 05.11.2026 |

***Vavið av byggingini***
Uppgávan fevnir um eina nýggja og munandi størri farstøð ið skal bjóða ferðandi góð og rúmlig øki við góðum hentleikum, her undir munandi øking av uppihalds- og sitiøkjum; øki til bíðisalong (Lounge), til trygd (Security), viðførismóttøku, handilsøki (duty free) umframt øki til ymisk sølustøð, herundir kaffistovur, brúkslutir, føroyskar sniðvørur o.l. Nýggji parturin av Farstøðini skal verða í 2 hæddum, og

møguleiki er eisini at partar av verandi farstøð kunnu gerast í tveimum hæddum. Nýggja farstøðin fer eisini at hava brúgvar  til flogførini, soleiðis at flest øll ferðandi koma til og frá flogfarinum undir taki, beinleiðis frá farstøðini. Verandi farstøð verður heilt ella partvís umbygd og flættað saman við nýggju farstøðini. Stórur dentur verður lagdur á funksjónir, tvs. logistik  og flow gjøgnum farstøðina, tí skal serfrøði innan hetta økið vera partur arbeiðinum, bæði undir prosjektering og bygging.

Tað er av alstórum týdningi at út- og umbyggingin ikki hevur týðandi ávirkan á dagliga raksturin av Vága Floghavn, meðan bygt verður, og at teir bjóðandi gjølliga umhugsa og takað hædd fyri hesum í samband við uppskot sítt til skipan av byggingini í byggistigini.

Fyri at fáa mest møguligt burtur tíðarstýringini, eigur verkætlan at verða býtt upp í stig, so niðurríving og grovplanering, eru gjørd áðrenn lisitasjónina av samlaðu verkætlanini.

Verandi farstøð hevur eina nettovídd á 4.670 $m^2$. Samlaða nettovíddin av eini ný- og umbygdari farstøð er um 13.300 $m^2$

Økið er partur av matr. 427a, Sørvágs bygd.



*Mynd 1: Skitsa av byggiøki. harafturat verða brúgvar frá farstøð til flogførini.*

Arbeiðið at byggja, verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku. Fíggjarligi karmurin fyri verkætlanina er mettur til 500 mió. kr (uttan MVG) í handverkaraútreiðslum (HVÚ - tilboð), herundir leyst og fast innbúgv, tól og teknisk útgerð.

***Umsóknarfreist***
Umsókn um undangóðkenning skal sendast við telduposti (ella t.d. við WeTransfer) til RÁÐ, Mikkel H. Frandsen, mhf@rad.fo í seinasta lagi 30.10.2024 kl.12.00.

Umsóknin skal vera á føroyskum, skandinaviskum ella enskum.

Latin verður ikki samsýning fyri umsókn um undangóðkenning.

***Spurningar***
Spurningar í samband við undangóðkenningina skulu sendast til RÁÐ, Mikkel H. Frandsen, mhf@rad.fo
Spurningar í sambandi við undangóðkenningina verða svaraðir seinast 28.10.2024.
Spurningar, sum verða settir eftir 24.10.2024, verða svaraðir so vítt til ber, men er ikki vissa fyri hesum.

***Krøv til umsókn um undagóðkenning***
Umsóknin um undangóðkenning skal innihalda:

- Virkisupplýsingar (virkisnavn, bústaður, teldupostur, teldupostur hjá kontaktpersóni)
  - Er umsøkjarin eitt samtak ella líknandi, skal bygnaður á samtakinum lýsast fyri seg, við upplýsingum um navn á virki og bústað, umboði fyri samtakið og umboð fyri hvønn luttakara í samtakinum. (Fylgiskjal Samtaksváttan)
    - Samtakið kann bert hava eina einstaka ráðgevarafyritøku við ábyrgd fyri hvørt fak, sum tó kann hava undirráðgevar
- Skjalfesting av viðkomandi vinnuábyrgdartrygging, íroknað persónskaða við upplýsing um tryggingarfelag, dekning og dekningstíðarskeið
- Tal av starvsfólkum hjá virkinum seinastu 3 árini, deilt á fakbólkar.
- Tilvísingarlisti fyri í mesta lagi 5 samanberligar verkætlanir. Dentur verður lagdur á uppgávur innan farstøðir ella aðrar størri og viðkomandi verkætlanir. Tilvísingar skula lýsast við byggikostnað (HVÚ), bruttovídd, slagi av bygging og lýsing av leiklutinum hjá umsøkjara (maks. 1 A4 síða)
- Lýsing av dygdartryggingarskipanin hjá virkinum (maks. 1 A4 síða)
- Verkætlanarbygnaður hjá heildarráðgeva og møguligum undirráðgevum. Somuleiðis frágreiðing um fakpersónar við servitan innan funksjón og logistikk innan farstøðir til floghavnir (er eisini undir byggitíðarskeiðið) sum er knýttir at prosjekteringini; umframt brunatøkniligar ráðgevar.
- Verður umsóknin innlatin av ~~heildarráðgeva ella~~ samtaki, skulu veitast kravdu upplýsingarnir fyri allar luttakarnar í samtakinum.
- Verður umsóknin innlatin av samtaki, skal váttan fyriliggja, har luttakarnir í samtakinum átaka sær, samhaldsfast at hefta fyri sáttmálanum, um so er at sáttmálin verður gjørdur við samtakið.
- Um somu fyritøka er við í fleiri liðum, tekur byggiharrin sær rætt til at seta treytir í sambandi við undangóðkenningina.

## Tilgongd

***Útveljing millum skikkaðu umsøkjarnar***
Valdir verða 3-5 at geva tilboð.
Útveljngin verður grundað á meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, hvussu viðkomandi framsendu tilvísingarnar eru umframt leiklut umsøkjarans í hesum. Serliga verður dentur lagdur á tilvísingar sum fevna um líknadi byggjarí sum farstøðir.

***Verkætlanarkapping***
Undangóðkendu luttakarar verða bodnir at luttaka í verkætlanarkapping um útbygging av farstøðini.
Útbjoðingartilfarið verður ætlandi sent undangóðkendu feløgunum 13.11.2024, og verða tilboðini væntandi latin inn 08.05.2025.
Vinnandi uppskotið verður valt út frá atlitinum"Búskaparliga mest lønandi tilboðið" grundað á hesi metingarstøði:

- Arkitekturur og funktión
- Verkætlanarbygnaður & processlýsing
- Kostnaður av heildarráðgeving

Fyri tey tilboð, sum lúka treytirnar (eru kondisjónsmessig), men sum ikki vinna útboðið, verður latin samsýning á 500.000,- kr. Vinnarin fær í boði at skriva sáttmála um uppgávuna.